# 20 AV TEIMUM STÓRU

## Gjøgnumgongd av útvaldum roknskapartølum hjá 20 av teimum stóru fyritøkunum í Føroyum

## Um greiningina

Greiningin er gjørd við útgangsstøði í almennu roknskapunum hjá 20 teimum størstu fyritøkunum í Føroyum.

Tá mett hevur verið um støddina á felagnum, er útgangsstøðið tikið í upplýstari nettosølu hjá felagnum.

Fíggjarfeløg, íroknað peningastovnar, tryggingarfeløg o.l. eru ikki tikin við í greiningina. Harumframt verður mett, at Bakkafrost er somikið stórt í mun til hini feløgini, at hetta felagið skeiklar tølini, og tískil er Bakkafrost valt frá hesaferð til greiningina.

## Roknskapartøl fyri árini 2015 – 2019

Greiningin er gjørd útfrá almennu roknskapunum hjá feløgunum fyri árini 2015 – 2019. Greiningin samanber vøkstur og vakstrartøl fyri eitt tíðarskeið uppá 5 ár.

## Viðkomandi lyklatøl

Greiningin lýsir gongdina hjá feløgunum við hesum lyklatølum:

- Nettosøla
- EBIT – Margin
- EBIT
- Íløgur
- Nettoskuld

## Feløgini í greiningini

Almennu roknskapirnir hjá fylgjandi feløgum eru nýttir í greiningini.

**Nettosølan er hækkað nógv í árinum, eins og nettoskuldin eisini er hækkað. Harafturímóti, so lækkað íløgurnar og EBIT marginan stendur í stað.**

7,5 %

**Nettosølan økist**

Nettosølan hjá teimum størru fyritøkunum hevur verið í støðugum vøkstri hesi seinastu 5 árini.

15 av teimum 20 valdu feløgunum hava havt eina øking í nettosølu.

Meðalvøkstur (vektað pr. felag) er 6,9% (2018: 3,5%) í meðan samlaði vøksturin er 7,5% (2018: 2,5%).

0,4%

**Øking í EBIT**

EBIT Marginan hækkar við 0,4%.

Rakstraríkast í % stendur mest sum í stað hjá feløgunum. Hetta viðførir sostatt, at tá nettosølan økist, so liggur eitt størri rakstraríkast í krónum eftir hjá feløgunum.

Um feløgini verða vektað eins, so er EBIT marginan hækkað við 0,2%.

Hóast hetta, so høvdu 11 av teimum 20 feløgunum eina lækking í EBIT, og gongdin hevur verið negativ hesi seinastu 5 árini.

-4,1%

**Íløgurnar minkað**

Íløgurnar hjá teimum størru feløgunum eru minkaðar við 4,1% samanhildið við seinasta ár.

Hóast lækkingina, so hava íløgurnar hjá teimum størru feløgunum verið støðugar millum 1,1 – 1,3 mia.kr. hesi seinastu 4 árini.

2,8%

**Øking í nettoskuld**

Nettoskuldin hjá teimum stóru feløgunum er økt við 2,8% í 2019.

Nettoskuldin hevur verið í einum støðugum vøkstri seinastu 4 árini.

Verða feløgini vektað eins, so lækkaði nettoskuldin 5,5% í meðal pr. felag.

# Lyklatøl

| | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vøkstur í nettosølu (%) | 7,5% | 2,5% | 4,2% | 6,3% | 5,4% |
| Nettosøla – tal (mia.kr.) | 10,7 | 10,0 | 9,7 | 9,3 | 8,8 |
| Nettosøla – Index (2015 = 100) | 122 | 114 | 111 | 106 | 100 |
| EBIT % | 10,2% | 9,9% | 13,3% | 15,2% | 10,9% |
| Íløgur (mia.kr.) | 1,3 | 1,3 | 1,1 | 1,3 | 0,9 |
| Rentuberandi skuld (mia.kr.) | 4,6 | 4,5 | 4,2 | 3,8 | 3,9 |
| Eginognarpartur (%) | 53,7% | 51,8% | 49,3% | 46,9% | 44,3% |
| Meðal ársverk (tal) | 3.579 | 3.408 | 3.197 | 3.168 | 3.157 |
| Umsetningur pr. ársverk (mió.kr.) | 4,1 | 4,1 | 3,9 | 3,9 | 3,2 |
| Ársúrslit (mia.kr.) | 0,9 | 0,8 | 1,1 | 1,1 | 0,8 |

# 7,5 %

Nettosølan øktist við 7,5% samanhildið við 2018.
Hetta er ein lutfalsliga stór øking samanhildið við undanfarnu 5 árini

## Vøksturin í nettosølu heldur fram í 2019.

Einstakar fyritøkur hava størri ávirkan á nettosøluna samanborið við aðrar. 3 av stóru½ fyritøkunum standa fyri 27% av samlaðu nettsøluni.

Samlaða nettosølan hevur verið í støðugum vøkstri hesi seinastu 5 árini, og er nettosølan økt úr 8,8 mia.kr. í 2015 til 10,7 mia.kr. í 2019, svarandi til eina øking uppá 1,9 mia.kr.

Samlaða nettosølan øktist við 7,5% í mun til undanfarna ár (2018: 2,5%), ið er ein vøktsur uppá 0,7 mia.kr.

Tann samlaða nettosølan fyri 2019 er 10,7 mia.kr. (2018: 10,0 mia.kr.).






## 15 av teimum 20 feløgunum hava økt nettosøluna

Í 2019 vóru 15 feløg, ið øktu nettosøluna (2018: 13). Herav 1 felag økti nettosøluna við meiri enn 20% (2018: 3).




Um feløgini verða vektað eins, er talan um eina øking upp á 6,9%, meðan samlaða nettosølan økist við 7,5%.

(við meðalvøkstri kann hvørt einstakt felag í mesta lagi hava eina ávirkan uppá +/- 100%).



# 0,4 %

EBIT marginan stendur mestsum í stað hjá teimum stóru feløgunum

**Rakstraravkastið hjá fyritøkunum er minkandi.**

EBIT-marginan stendur mestsum í stað á 10,3% (2018: 9,9%). Sæð yvir eitt 5 ára tíðarskeið, er gongdin tó niðurgangandi.

Hóast samlaða EBIT-marginan er óbroytt, so eru nøkur feløg, ið hava økt EBIT marginuna samanhildið við undanfarna ár.

Niðanfyri eru tey 3 feløgini, ið høvdu størstu prosentvísu økingina í EBIT í mun til 2018.









### Samlaða rakstraravkastið økist aftur í 2019

Rakstraríkastið hevur verið minkandi síðani 2016. Hendan gongdin varð vend í 2019, har rakstraríkastið aftur var hægri enn árið fyri.




### Hvørt felag hevur í meðal økt um rakstraríkastið við 18,8% samanhildið við 2018.

Um feløgini verða vektað eins, so økist rakstraríkastið við 18,8% í mun til 2018.

Samlaða rakstraravkastið er økt við 11,8% samanhildið við 2018.



**-4,1 %**

Íløgurnar lækkaðar samanhildið við undanfarna ár.

## 1,3 mia.kr. í íløgum í 2019

Tær stóru fyritøkurnar hava brúkt slakar 1,3 mia.kr. í íløgum í 2019 (2018: 1,3 mia.kr.). Hóast íløgurnar í krónum standa í stað (avrundað), so er talan um eina minking uppá 4,1%.

13 av 20 fyritøkum gjørdu færri íløgur í 2019 samanhildið við undanfarna ár (2018: 7 feløg).









## Netto rentuberandi skuld økt við 2,8%

Samlaða nettoskuldin hjá fyritøkunum er økt við 2,8%. Verða feløgini hinvegin vektað eins, er talan um eina minking í nettoskuldini uppá -5,5%.

Samanlagt er talan um økta skuld upp á tils. 127 mió.kr.









## Fyrivarni

Greiningin er bert ætlað sum ein almenn kunning um viðurskifti, ið kunnu hava áhuga, og skal ikki metast sum ráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá teirru upplýsingum, sum eru í greiningini uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan ella vissu um rættleikan ella fullkomileikan av teirru upplýsingum, ið eru tiknar við í hesi greiningini.